# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo


***Skrásetingar nr.:***

**L-A004-1**

# Leiðbeining
# um
# hoyrnarvernd

Henda leiðbeining Arbeiðseftirlitsins veitir upplýsing um hoyrnarvernd, og nýtslu tess.

Hoyrnarvernd fæst í tveimum sløgum:

- Oyrnakoppar, sum fjalir oyru
- Oyrnatøppur, festur í oyrnalustina.

***Nýtsla*.**

Hoynarvernd er bert ein neyðloysn og eingin endalig loysn fyri óljóð-trupulleikar.

Trupuleikar av óljóði skulu bøtast um, har tað kemur í. Sí annars leiðbeining nr. L-A004-2 viðvíkjandi ljóðdoyving.

Hoyrnarvern skal nýtast, har óljóð ikki á annan hátt kann doyvast nóg væl.

Er óljóðið á arbeiðsplássinum meira enn 85 dB(A), yvir ein arbeiðsdag uppá 8 tímar, skal arbeiðsgevarin bert loyva, at arbeitt verður, um hoyrnarvernd verður nýtt.

Um óljóðhæddin fer upp um 80 dB(A), skal arbeiðsgevarin útvega hoyrnarvernd.

Um óljóðávirkanin sum heild er skaðilig ella nervar ógvuliga nógv, skal arbeiðsgevarin útvega hoyrnarvernd. Tað kann t.d. verða neyðugt har arbeitt verður stutt tíðarskeið í nógvum larmi, ella í arbeiði, har bráður larmur stendist, hóast óljóðið ikki fer upp um 80 dB(A).

Rátt verður til at nýta hoyrnarvernd, har óljóð fer upp um 80 dB(A). Áhaldandi óljóð, sum fer upp um hetta mark, kann elva til hoyrnarskaðar.

Hoyrnarvernd kann í vissan mun tarna fólki í at tosa saman og hervið verður brúkarin avbyrgdur frá umheiminum. Tað skal brúkarin gerast varugur við soleiðis, at møguligar vandamiklar støður kunnu fyribyrgjast.

***Lógarheimild:***

Kunngerð nr. K-A004-1 frá 4. september 1995 um markvirði fyri óljóð á arbeiðsplássum.


***Útgivið fyrstu ferð:*** **13. desember 1988**

***Seinastu broytingar:*** **4. september 1995**



*Arbeiðsgevarin* skal syrgja fyri:

- at arbeiðsfólkið fær útvegað persónliga hoyrnarvernd, sum ikki tarnar meira enn hægst neyðugt.
- at arbeiðsfólkið fær leiðbeining um nýtslu eins og upplýsing um vandan, tá hoyrnarvernd ikki verður nýtt. Leiðbeining skal eisini fevna um hóskandi støðd av hoyrnarvernd, viðlíkahald og hvussu hoyrnarverndin skal goymast.
- at arbeiðsfólkið fær vitan um, hvussu hoyrnarverndin skal viðlíkahaldast og reinskast.
-

Arbeiðsgevarin útvegar og rindar fyri hoyrnarvernd, sum hann eisini hevur ognarrættin til.

*Arbeiðsfólkið* skal nýta hoyrnarvernd, har arbeiðsumstøðurnar krevja tað.

## ***Brúkaraleiðbeining***.

Tá sølumaðurin letur hoyrnarverndina, skal brúkaraleiðbeining á føroyskum ella danskum máli fylgja við, sum upplýsir um verjueginleikar, hvussu verndin skal sita, nýtast og viðlíkahaldast og hvussu hon skal goymast.

## ***Trygdarskelti***.

Har neyðugt er at arbeiða við hoyrnarvernd, skal skelti setast upp, sum sigur frá hesum. Skeltið er blátt við hvítari áskrift, og kann samstundis hava uppískoyti, sum vísur slagið av hoyrnarvernd, ið skal nýtast.

Dømi kunni eisini vera um arbeiðspláss har hoyrnarvernd skal nýtast, ið er spjatt yvir so stórt øki, at neyðugt er við fleiri skeltum..

## ***Vernd og eginleikar***.

Verður hoyrnarvernd rætt og støðugt nýtt, kann hon verja hoyrnuna og minka um óljóðtyngingina við umleið hesum tølum:

- fyri oyratøppar: 10-20dB
- fyri oyrnakoppar: 20-30dB

Óljóðtyngdin kann bert bøtast um, tá hoyrnarverndin verður nýtt støðugt, har óljóðið er omanfyri 80 dB (A). Um hoyrnarverndin ikki verður nýtt - bert eitt lítið bil í nógvum larmi, minkar óljóðverjan munandi.

## ***Hóskandi hoyrnarvernd og viðlíkahald***.

Hoyrnarverndin skal hóska til persónin, sum nýtir hana. Um hoyrnarvernd ikki situr til persón sum nýtir hana, kunnu vansar standast, eitt nú hiti, trýst, ørkymlan í holdið og ovurviðkvæmi. Vansin kann verða ymiskur frá einum persóni til annan. Tí er umráðandi at hava fleiri sløg av hoyrnarvernd tøk, soleiðis at tann einstaki kann velja sær hana, ið hevur minst vansar við sær.

Skal hoyrnarverndin varðveita evni at doyva óljóð, skal hon handfarast og umsitast á rættan hátt. Broytist skapið á hoyrnarverndini, kann tað hava við sær, at óljóðverjan minkar ella fellur burtur.

Tættningslistar á oyraklaffum skulu kannast regluliga, og eiga at verða skiftir út, tá teir verða stirvnir ella skaddir.

Glasdún ella onnur sløg av eingangstøppum, mugu bert nýtast eina ferð.

Oyratøppar úr plasttilfari, gummi el. líkn., eins og tættningslistar á oyraklaffum, skulu reingerast væl og virðiliga (helst dagliga). Nýtið framferðarhátt sum víst er til í brúkaraleiðbeiningini.

Tá hoyrnarverndin ikki er í nýtslu, skal hon goymast soleiðis, at skittur og dust ikki sleppur at, og soleiðis at hon ikki verður avskeplað.




**Eksempler på anvendelse af hørekopper**




**Eksempler på anvendelse af ørepropper**

**Arbeiðseftirlitið, tann 13. desember 1988**

Eli Davidsen, stjóri